Almannamálaráðið

Dagfesting: 29. sept. 2020
Mál nr.: 19/00733-11
Málsviðgjørt: Heri Petersen

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum broytt við løgtingslóg 142 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 138 frá 16. desember 2015, løgtingslóg nr. 132 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 76 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 103 frá 13. juli 2017 og løgtingslóg nr. 152 frá 12. desember 2018 verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. *Stk. 2…* *Stk. 3*. Fevnd av hesi lóg eru: 1) persónur, sum fær veiting vegna arbeiðsloysi, sbrt. § 9 í forsorgarlógini, 2) persónur, sum fær veiting vegna sjúku ella øðrum trupulleikum enn arbeiðsloysi, sbrt. § 9 í forsorgarlógini,	**1.** Í § 1, stk. 3, nr. 1 og 2 verður "§ 9 í forsorgarlógini" broytt til: "§ 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur"
§ 7. Persónur, ið luttekur í virknisvenjing, fær framhaldandi stuðulsveiting sbrt. § 9 í forsorgarlógini ella lóg um dagpening vegna sjúku v.m.	**2.** § 7, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis: "Persónur, ið luttekur í virknisvenjing, fær framhaldandi stuðulsveiting sbrt. § 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um

...	almannatrygd og tænastur ella sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.”.
§ 12. Í sambandi við fyriskipan sbrt. § 9, stk. 1, nr. 1, 4, 5 og 6 verður stuðul veittur til uppihald sambært fylgjandi ásetingum: 1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 100% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 80% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 3) Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 85% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 4) [4)] Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 60% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 50% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 30% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. …. …. **§ 13 a.** Hóast ásetingarnar í § 12, stk. 1 verður stuðul til uppihald til lesandi, ið fáa lestrarstuðul, sambært løgtingslóg um lestrarstuðul, veittur sambært fylgjandi ásetingum: 1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 37% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. Fyri hvørt barnið aftrat fyrsta barninum, ið hevur skrásettan bústað hjá viðkomandi, lækkar veitingin við 20%.	**3.** Í § 12, stk. 1, nr. 1-6 og í § 13 a, stk. 1, nr. 1-7 verður “dagpeningaupphæddini um mánaðin” broytt til: “hægstu uppihaldsveiting”.

2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 34% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. Fyri hvørt barnið aftrat fyrsta barninum, ið hevur skrásettan bústað hjá viðkomandi, lækkar veitingin við 18%. 3) Persónur, 25 ár ella eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 50% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 4) Persónur, 25 ár ella eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 28% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 5) Persónur, yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 21% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 6) Persónur, yngri enn 25 ár, ið býr hjá foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 16% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 7) Persónur, ið er uppihaldari at barni, og sum livir í samlívi ella er giftur við persóni, ið er lesandi, og sum móttekur lestrarstuðul, fær 44% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. 8) Persónur, ið býr einsamallur, og sum rindar barnagjald fær 50% av dagpeningaupphæddini. 9) Persónur, ið er sambúgvandi, sum ikki hevur heimabúgvandi børn, men sum rindar barnagjald, fær 28% av dagpeningaupphæddini.	
§ 12. .. *Stk. 2.* Dagpeningaupphædd sbrt. stk. 1 er at skilja sum hægsta útgjald sambært lóg um dagpening vegna sjúku v.m., frítíðarløn ikki íroknað. Sambúgvandi er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni.	**4.** § 12, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Hægsta uppihaldsveiting sbrt. hesi løgtingslóg er ásett í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Sambúgvandi er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni."

§ 12…. … … *Stk. 4.* Um persónur vegna djúptøknar sálarligar trupulleikar, samansettar (kompleksar) sosialar trupulleikar ella vegna kropsligt brek má hava bústað av ávísum slagi og harvið hægri bústaðarútreiðslur, kann eitt bústaðarískoyti latast til hesar útreiðslur umframt veitingina sambært stk. 1, § 13 a, stk. 1 ella § 14, stk. 1, nr. 1.	**5.** § 12, stk. 4 verður orðað soleiðis: "*Stk. 4.* Persónur, sum vegna týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar, sum má hava ávísan bústað og harvið hægri bústaðarútreiðslur, kann, umframt veitingina sbrt. stk. 1, § 13 a, stk. 1 ella § 14, stk. 1, fáa fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslur."
§ 13 a. ... ... 8) [5] Persónur, ið býr einsamallur, og sum rindar barnagjald fær 50% av dagpeningaupphæddini. 9) [5] Persónur, ið er sambúgvandi, sum ikki hevur heimabúgvandi børn, men sum rindar barnagjald, fær 28% av dagpeningaupphæddini.	**6.** Í § 13 a, stk. 1, nr. 8-9 verður "dagpeningaupphæddini" broytt til: "hægstu uppihaldsveiting".
§ 16... *Stk. 2.* Við burturfall av stuðli kann persónur søkja um veiting sbrt. § 9 í lóg um almenna forsorg.	**7.** Í § 16, stk. 2 verður "§ 9 í lóg um almenna forsorg" broytt til: "§ 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".
§ 19. Umframt stuðul ella lønarískoyti sbrt. § 12 ella 14 kann stuðul eisini veitast til tilfar, útgerð og aðrar útreiðslur, ið eru ein fylgja av fyriskipanini, men sum ikki eru at meta sum ábyrgd hjá arbeiðsgevara ella skúlaverki at útvega.	**8.** Í § 19, stk. 1 verður "§ 12 ella 14" broytt til: "§§ 12, 13 a ella 14".
§ 19... *Stk. 2.* Stuðul til aðrar stakútreiðslur verður veittur sbrt. § 15 í lóg um almenna forsorg	**9.** Í § 19, stk. 2 verður "§ 15 í lóg um almenna forsorg" broytt til: "§ 19 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".
§ 19.... .... *Stk. 3.* Hjálparráð at nýta í sambandi við arbeiðsbúgving verða veitt sbrt. § 18 b í lóg um almenna forsorg.	**10.** Í § 19, stk. 3 verður "§ 18 b í lóg um almenna forsorg" broytt til: "§ 29 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

§ 22. Lønarískoytið sbrt. § 21 verður veitt sum endurgjald fyri lønarmiss orsakað av mista arbeiðsførleikanum. Lønarískoytið verður veitt upp til viðkomandi sáttmálaløn, tó í mesta lagi 22.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirløn. *Stk. 2.* Arbeiðsgevarin rindar løn sambært viðkomandi sáttmála fyri arbeiðstíðina, sum arbeiðið hjá viðkomandi løntakara verður mett at samsvara við, tó í minsta lagi 2.000 kr. um mánaðin í løn. *Stk. 3.* Løn og lønarískoyti tilsamans kunnu ikki vera hægri enn sáttmálaløn, samsvarandi við starvsbrøkin, sum viðkomandi arbeiddi frammanundan. *Stk. 4.* Við løn sbrt. stk. 3 er ikki at skilja løn hjá fyritíðarpensjónisti, sum fer í tillagað starv sambært treytum í § 3, stk. 1, 1. pkt. *Stk. 5.* Um persónur hevur aðra lønarinntøku, enn avtalað, fellur lønarískoytið burtur. Inntøka frá kommunalari ella borgarligari umboðan, er tó ikki at rokna sum lønarinntøka. *Stk. 6.* Upphæddin á 2.000 kr. sbrt. stk. 2 verður javnað í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum.	**11.** § 22 verður orðað soleiðis: "**§ 22.** Lønarískoyti sbrt. § 21 er í mesta lagi 18.552 kr. um mánaðin umframt frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald sbrt. løgtingslóg um eftirløn. *Stk. 2.* Arbeiðsgevarin rindar løn sbrt. viðkomandi sáttmála fyri arbeiðstíðina, sum arbeiðsavrikið hjá viðkomandi løntakara verður mett at samsvara við. Lønarískoyti verður veitt sum endurgjald fyri lønarmiss orsakað av minkaða arbeiðsførleikanum. *Stk. 3.* Hægsta lønarískoyti verður veitt, tá arbeiðsgevari rindar 2.000 kr. um mánaðin í løn. Lønarískoytið verður lækkað við 40% av inntøku frá arbeiðsgevaranum oman fyri upphæddina á 2.000 kr. *Stk. 4.* Løn og lønarískoyti tilsamans kann ikki vera hægri enn løn sbrt. viðkomandi sáttmála samsvarandi við starvsbrøkin, sum viðkomandi arbeiddi frammanundan. *Stk. 5.* Við løn sbrt. stk. 4 er ikki at skilja løn hjá fyritíðarpensjónisti, sum fer í tillagað starv sbrt. treytum í § 3, stk. 1, pkt. 1. *Stk. 6.* Lønarískoytið fellur burtur, tá tað er lægri enn 1/5 av upphæddini sbrt. stk. 1. *Stk. 7.* Um persónur hevur aðra lønarinntøku, enn avtalað, fellur lønarískoytið burtur. Inntøka frá kommunalari ella borgarligari umboðan er tó ikki at rokna sum lønarinntøka. *Stk. 8.* Upphæddir sbrt. stk. 1 og 3 verða javnaðar sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."
§ 23... *Stk. 2.* Almannaverkið metir um minkaða arbeiðsførleikan, og ger í samsvari við hesa meting avtalu við arbeiðsgevara um løn frá arbeiðsgevara og lønarískoyti.	**12.** § 23, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Almannaverkið metir um minkaða arbeiðsførleikan og ásetir lønarískoytið við støði í væntaðari lønarinntøku frá arbeiðsgevara. Lønarískoytið verður ásett fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið, sbr. tó stk. 3.

	Almannaverkið rindar lønarískoyti beinleiðis til arbeiðstakaran og frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald eftir galdandi reglum.”
	13. Í § 23 verða aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett: “*Stk. 3.* Almannaverkið hevur eftirlit við, at tann løn, sum arbeiðsgevarin rindar, samsvarar við tann brøk, sum arbeiðstakarin er mettur at vera skerdur og tekur mál upp til nýggja viðgerð, um ósamsvar er millum ta løn, sum arbeiðsgevarin rindar, og arbeiðstakari er mettur at vera skerdur. *Stk. 4.* Tað er ein treyt fyri at fáa lønarískoyti, at arbeiðstakarin er í framhaldandi starvi, og at Almannaverkið hevur eftirlit.” Stk. 3-5 verða eftir hetta stk. 5-7.
§ 26... *Stk. 2.* Um persónur í tillagaðum starvi eftir í minsta lagi eitt ár missir sítt starv, og ikki hevur rætt til arbeiðsloysisstuðul sambært lóg um arbeiðsloysistrygging, og viðkomandi ikki hevur nýtt tillagað starv í boði, fær viðkomandi veiting sambært § 9 í forsorgarlógini vegna arbeiðsloysi uttan mun til ogn hjá viðkomandi ella inntøku og ogn hjá hjúnafelaga, tó í mesta lagi í 12 mánaðir.	**14.** Í § 26, stk. 2 verður “sambært § 9 í forsorgarlógini vegna arbeiðsloysi uttan mun til ogn hjá viðkomandi ella inntøku og ogn hjá hjúnafelaga” broytt til: “vegna arbeiðsloysi sbrt. § 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, uttan mun til ogn”.
§ 27. Um persónur, ið hevur fingið stuðulsveiting sambært § 12, ikki hevur arbeiði eftir lokna fyriskipan sbrt. § 9, stk. 1, nr. 1 og 2, fær viðkomandi í eitt tíðarskeið á í mesta lagi tríggjar mánaðir veiting sbrt. § 9 í lóg um almenna forsorg uttan mun til ogn hjá viðkomandi ella inntøku og ogn hjá hjúnafelaga, roknað frá síðsta degi í tí mánaði, fyriskipanin endaði.	**15.** Í § 27, stk. 1 verður “§ 9 í lóg um almenna forsorg uttan mun til ogn hjá viðkomandi ella inntøku og ogn hjá hjúnafelaga” broytt til: “§ 11, sbr. § 12, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, uttan mun til ogn”.
§ 36. Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu innan 4 vikur eftir, at kærari hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.	**16.** Í § 36 verður “Kærunevndina í almanna- og heilsumálum” broytt til: “Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum”.

	§ 2 *Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021. *Stk. 2.* Persónur, sum er í tillagaðum ella vardum starvi, áðrenn henda løgtingslóg fær gildi, fær lønarískoyti eftir higartil galdandi reglum. Tó verður áseting og eftirlit framt eftir ásetingunum í § 23, stk. 2 og 3, og lønarískoytið kann ikki vera hægri enn 19.900 kr. um mánaðin. *Stk. 3.* Fer persónur í tillagaðum ella vardum starvi eftir higartil galdandi reglum í annað ella nýtt tillagað starv, verður tað viðgjørt eftir reglunum í hesi løgtingslóg.